# BILAR

SAMBAND
MAGNU GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Rás2**

*Bilradio verður í hesi vikuni sent týsdag kl. 15.10, fríggjadag kl. 8.05 og leygardag kl. 13.*

# Bunkra bilin við at skifta battarí

**Sambært orkufelagsskapunum Dong Energy og Better Place kunnu vit rokna við at bilarnir í framtíðini fara at koyra inn á servicestøðir at skifta battarí ístaðin fyri olju ella bensin. Hetta kom fram á einum fyrilestri í Norðurlandahúsinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Finn Jakobsen*

Mánakvøldið 6. oktober skipaðu elfelagið SEV og Sp/f Baldursbrá hjá Johan Mortensen fyri einum fyrilestri í Norðurlandahúsinum, har Jane Pedersen frá orkufelagsskapinum Dong Energy í Danmark greiddi frá um alternativa orku og el-bilar.

Dong Energy arbeiðir saman við amerikanska felagnum Better Place um nógvar spennandi loysnir við alternativari el-megi, sum t.d. sólar- og vindorku. Ein av framtíðarverkætlanunum gongur í stuttum út upp á at nýta orkuna frá vindmyllum.

Vindmyllurnar koyra alt samdøgrið og um náttina er streymnýtslan munandi minni enn um dagin. Yvirskotið frá streymframleiðsluni um náttina fer til løðing av accumulatorum, sum kunnu nýtast til bilar soleiðis at el-bilar í framtíðini kunnu koyra inn á servicestøðir at "bunkra" við at skifta tann tóma akkumulatorin út við ein uppløddan.

Sponsorar til tiltakið í Norðurlandahúsinum vóru Hotel Føroyar, Norðfra, Føroya Bjór, Musikkskúlin og Norðurlandahúsið.

Í einum komandi blað fara vit at skriva meira nágreiniliga um hesa verkætlan.




*Jane Pedersen frá Dong Energy greiðir frá um el-bilar*



*Millum tvey og trý hundrað fólk vóru til fyrilestrin*



*Ingeborg Godtfred frá SEV og Jane Pedersen frá Dong Energy*

# Bilrøkt og VR Bilar samstarva um leigubilar




Sp/f Bilrøkt hevur keypt leigubilarnar hjá bilasøluni VR Bilar og ein avtala er gjørd partanna millum. Avtalan gongur eisini út upp á, at tey sum seta bilin á verkstað hjá VR Bilum og hava brúk fyri einum leigubili, fáa hann frá Bilrøkt.

Jákup á Borg frá Bilrøkt sigur, at teir hava í longri tíð havt gott samstarv við VR Bilar, og báðir partar eru væl nøgdir við nýggja samstarvið.

*Jákup á Borg frá Bilrøkt og Jóhan Petur Olsen, stjóri hjá VR Bilum, hava gjørt samstarvsavtalu um leigubilar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*